# Heini Joensen farin



Fríggjadagin 18. august doyði Heini Joensen í Svínoy á Landssjúkrahúsinum. Hann var føddur 12. juni í 1931 og sostatt 75 ára gamal, nú hann slóknaði.

Heini var giftur við Fríðgerð Joensen, sum er úr Heimistovu í Svínoy. Tey bæði høvdu gullbrúdleyp mánadagin 7. august ella fyri tveimum vikum síðani. Stóra dagin hildu tey heima hjá soninum Hera. Fitt av fólki vitjaði í prestagarðinum við Landavegin.

Hetta vísti seg at vera seinasta ferðin, at tað bar til at heilsa upp á Heina, sum hevur verið heilsuveikur seinastu árini, men sum júst henda dagin tóktist vera hampuliga væl upplagdur.

Heini var svínoyingur. Foreldrini vóru Petra og Sámal Joensen. Tey búðu fyri tað mesta í Havn, og fingu trý børn. Angelica (1930) í Havn, Heini (1931) og Ísak (1932) í Klaksvík.

Heini vaks upp hjá ommmuni í Svínoy, Malenu. Hon var dóttir Maren Cathrinu og Rasmus Olsen úti á Bø. Abbin, Heini, doyði tíðliga, og omman sat einkja, tá ið Heini sum heilt lítil smádrongur kom til Svínoyar at vera.

Heini sat við festinum Har Heimi, og hann var í mong ár skipsmaður og útróðrarmaður. Í nógv ár róði hann út við Fuglbergi og Áarbergi, sum svínoyingurin Poul Justinussen, sáli, sum búði í Klaksvík, átti. Eftir at Poul Justinussen hevði selt bátarnar, fór Heini at arbeiða heima í Svínoy. Tað gjørdi hann so leingi, sum orkan var til tað.

Miðskeiðis í seksti árunum keyptu Fríðgerð og Heini hús uppi á Váli, og har hava tey búð síðani. Børnini hjá teimum eru Heri (1956) og Anna Jórun (1969). Tey búgva bæði í Havn.

Fríðgerð og Heini hava verið millum álitisfólkini í heimbygdini. Serliga síðani kríggið er fólkatalið nógv minkað í Svínoy. Tá ið tað nú hevur lagað seg soleiðis, hevur tað komið væl við, at tað hava verið tey, sum so at siga hava hildið tørn og kent ábyrgd.

Heini, sum var friðarligur, fyrikomandi og dámligur maður, var deknur í Svínoyar kirkju, haðani hann verður grivin mikudagin.

J

## Andlát og jarðarferðir

**Berlina Sólsker**, ættað av **Eiði**, búsitandi í **Havn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 20. august, 76 ára gomul.

**Theodor Eliasen, Leirvík**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 19. august, 85 ára gamal.

**Jens Mortan Olsen, Klaksvík**, andaðist í heiminum leygarmorgunin 19. august, 63 ára gamal.

**Anna K. Madsen, Kvívík**, andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði leygardagin 19. august, 91 ára gomul.

**Heini Joensen, Svínoy**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 18. august, 75 ára gamal.

Marjun Jóanesardóttir:

# Listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

TÍÐINDASKRIV



Hósdagin 24.august kl. 15 letur ein listaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað er Marjun Jóanesardóttir, sum sýnir fram. Marjun arbeiðir nú sum listafólk burturav. Í mong ár hevur hon, við síðuna av arbeiði sínum sum ergoterapeutur, fingist við ymiska list. Serliga hevur hon gjørt seg galdandi innan sjónleik og sjónvarp, ella rættari – aftanfyri pallin, har hon hevur evnað til leikbúnar, maskur, parykkar og nógvar løgnar verur, so sum Trøllapætur og Ommuna, talandi drekar, og – you name it.....

Nú, hon gongur móti teimum fimmti, frøðist hon um at kunna brúka meira tíð til skapandi list. Hon heldur ikki tað er stórur munur á, at gera eina serliga masku til ein sjónleikara ella mála ein málning. Í báðum føri má hon royna at finna tað heilt rætta tilfarið og teknikkin til at lýsa tað, hon fegin vil.

Hetta er fyrsta stakframsýning hennara. Íblásturin til litríku myndirnar er serliga gleðin yvir náttúruna.

Framsýningin, ið er opin til og við mikudagin 30. august, er opin allar dagar frá kl. 15 til kl.19, tó er opið leygardagin frá kl. 10 til kl. 13.

**Dagurin í morgin**

**22. august. Symphorianus**, deyður í umleið ár 180. Kristin ungur maður úr Autun í rómverska landinum Galliu (Suðurfraklandi). Varð tikin av døgum, av tí at hann ikki vildi tilbiðja skurðgudamyndir í Cybeletemplinum.

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæri pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Olaf Michelsen**

andaðist og varð jarðaður.

*Vegna familjuna*
**Sólvá og Ólavur**

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Sveinbjørn Pauli Kvilt**
Skála

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum.
Tøkk til Hera Joensen, prest og tykkum, sum vóru komin saman í kapellinum.
Tøkk til Emil Olsen, prest.
Tøkk fyri troystarrík orð.
Tøkk til sangarar, organist og kirkjutænara, berarar og gravara.
Tøkk fyri uppringingar, blómur og kransar og tøkk tit øll, ið hjálptu á annan hátt.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarsstað.
Hjartans tøkk øll somul.

*Vegna tey avvarðandi*
**Katrin, Tórhild, Elinborg, Trygvi og Jórun**

Okkara kæra mamma, vermanna, omma og langomma

**Anna K. Madsen**
Kvívík

andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði leygardagin 19. august, 91 ára gomul.

Jarðarferðin verður mikudagin kl. 14.00 úr Kvívíkar kirkju.

*Vegna tey avvarðandi*
**Ingibjartur, Asbjørn, Gullak, Ása og Árni**

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara góði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Theodor F. Eliasen**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 19. august, 85 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Hebron í Leirvík mikudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elisabeth**
**Jón, Korinta, Tummas, Sigrun og Eydna**

*Tey, ið ynskja at minnast Theodor, kunnu senda eina gávu til Akurin, konto í peningastovninum.*